

*– Nógv starvsfólk hava starvast her øll síni virkisár, og hava trivist sera væl, sigur Eyðun Joensen, sum í 30 ár starvaðist sum sálarfrøðingur á Psykiatriska Deplinum sum sæst í baksýni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Føroysk psykiatri 40 ár

Í hesi viku eru 40 ár liðin, síðani Psykiatriska deild lat upp í Føroyum, fyrst 1 deild av 5, fá ár seinri allar 5, nakað eftir Pensionatið og upp aftur seinri Demensdeild og Økispsykiatri.

Úr í øldir ongum, til í 1969 spildurnýtt sjúkrahús eftir tátíðar høgum standardi bæði viðv. bygningum, tólum og starvsfólkum.

Minnist sjálvur, hvussu fínt og nossligt alt kendist, og smittaði hetta óivað av upp á starvsfólk, sum eldhugað løgdust til.

Byrjanin var væl fyrireikað: Hølini snikkað til eftir frægastu fyrimyndum, sum tá vóru galdandi í okkara grannalondum. Kapasiteturin skuldi. upp á seg vera áleið hin sami sum aðrastaðni, síðani sálarsjúkutíttleikin vísti seg at vera nokk so líka, úr einum samfelagi í annað.

Føroysk starvsfólk høvdu frammanundan nomið sær neyðuga serútbúgving og arbeiðsroyndir aðrastaðir, og har, tað restaði í, lánti deildin fyrstu tíðina skikkaði starvsfólk uttanífrá, fram til at øll føroysk manning var serútbúgvin.

Árni Olsen, yvirlækni og undangongumaður við lít var sjálvur serútbúgvin og royndur innan bæði psykiatri og neurologi og fevndi sostatt víða. Hann helt skúla fyri sínum starvsfólkum drúgva tíð áðrenn upplating, og sostatt var so mangt væl fyrireikað.

Tá so allar 5 deildirnar vóru lidnar og mannaðar, fingu føroyskir varandi sálarsjúklingar niðri tilboð um at fáa framhaldsviðgerð og røkt í Føroyum, og tóku mong av.

Mesta seingjartalið mundi eitt skifti vera oman fyri 100 í afturlitinum av, at sinnissjúk fólk áður var ein so rár uppliving í almenna føroyska rúminum, síðani sálarsjúk undan Psyk. Deild einamest vóru havd í sjúkrakliva (celluni), ímeðan bíðað varð eftir farti til Danmarkar og undir krígnum til Bretlands.

Seinri er seingjatalið alsamt minkað og tað av góðum grundum. Tey mangan tilkomnu afturkomnu úr Danmark doyðu mong út av deildini av elli og øðrum natúrligum orsøkum, samstundis sum alheimsrákið eisini kom hendavegin um, sum mest at tøma psykiatriskar seingjadeildir og í staðin dúva upp á ambulanta viðgerð, kunning, økispsykiatri og sambýli kring landið.

### Eldhugað starvsfólk

Tá tað byrjaði, og í mong ár aftaná, virkaði Psyk.Deild sum heildarpsykiatri, har deildin tók sær av fólki í øllum aldri og við øllum hugsandi sálarligum sjúkratilburðum umframt menningartarn.

Deildirnar vóru ikki býttar upp í børn, ung, vaksin og uttan óneyðugt roks skúlaði sínar egnu røktarar bæði viðv. fakligum ástøði og praktikki.

Nú á døgum verður av røttum funnist at, at ungdómar skulu hýsast innandeilda saman við vaksnum og gomul, men roynt var kortini at røkka øllum, og skal eg sjálvur siga tað, gekst eftir umstøðunum bara væl.

> *Mær tykir størstu menningina farnu 40 árini tó vera tann tiltrongt vaksandi almenni opinleikin, kunnleikin, meðvitið og bøttur hugburður manna millum um sálarligar sjúkur*

Eldhugað starvsfólk tóku, við støði í tí einstaka sjúklingunum, røktina upp á seg, og so máttu umstøðurnar skikkast hareftir. Eisini hevur Psyk.deild alla sína tíð veitt fakligar tænastur til aðrar sjúkrahúsdeildir, almannaverkið og aðrar myndugleikar.

Á frálæruøkinum gingu ikki mong ár, til deildin saman við sjúkrasystraskúlanum skipaði so fyri, at lesandi ikki longur høvdu fyri neyðini at fara niður at taka psykiatriina, eins og deildin eitt skifti, hon manglaði røktarar, so bara og gomlum meira og minni í ørviti.

Minnist í tí sambandi okkum hava havt børn innløgd niður í 8-10 ár og uttan stórvegis trupulleikar, síðani tað bar til at sýna teimum serliga umsorgan og meðmenniskjuliga avskerming.

Nú á døgum verður psykiatriskt virksemi alsamt meira uppbýtt og spesialiserað, sum er gott, hóast vandi altíð er fyri, at sjúklingar kunnu detta niður ímillum "kassarnar".

"Bert lúsin útlendsk er...." og møguliga dugdu tey sakkønu betur aðrar staðir, men Psyk.deild hevur so eisini bundið ann við truplar og sjáldsamar sjúkratilburðir, sum aðrastaðir verða vístir á serdeild, men kortini spældi hjá okkum ofta bara væl av.

Psyk. Deild hevur ikki flutt nógvar sjúklingar til útlandið, og tá tað onkuntíð var gjørt at senda serliga ung og væntandi varandi sálarsjúk burtur til neyvari sjúkrugreining, so fingu vit tey aloftast aftur við somu diagnosu og viðgerðarætlan sum okkara egna.

### Kom í tøkum tíma

Tó tað sum fyri 40 árum síðani var framkomið og spildurnýtt, er umsíðir vorðið so misrøkt og niðurslitið, at ætlanir eru frammi um bara at javna alt tað gamla við jørðina og í staðin byggja nýggjan Psykiatriskan Depil.

Tó, tað sum nú verður minst aftur á er byrjanin og gongdin innan føroyska psykiatrti seinastu 40 árini.

Tað kom í tøkum tíma at nøkta, vísti tað seg, ein stóran tørv á psyiatriskum dugna.

Tað reingist ikki, at tilboðið og umstøðurnar eftir umstøðunum tá vóru optimalar.

Væl rúmaði nýggja psyk. deild tá eisini 4-songs stovur, sum síðani tíbetur eru býttar upp saman við øðrum ábótum, soleiðis at summar deildir nú bert rúma helvtina av upprunaliga 20 sjúklingum.

Samstundis sum nýggja Psyk.deild lat upp, starvaðist eg enn á Ríkissjúkrahúsinum, og har lógu so upp í 20 sjúklingar í sama rúmi, so í mun til sína framtíð tá var føroysk psykiatri frammarlaga.

Læknaverðin sigst í summum førum vera fongd við klandri og stríð millum starvsfólk.

So hevur ikki verið á Psyk.deild, tað eg minnist øll míni yvir 30 virkisár har. Nógv starvsfólk hava trivist væl og verið har øll síni virkisár, og eru onkur av teimum allar fyrstu eldsálunum har enn, umframt at komandi og farandi starvsfólk yvirhøvur bara hava róst tí góða arbeiðsandanum.

Men hóast alt, so tykir mær størstu menningina farnu 40 árini tó vera tann tiltrongt vaksandi almenni opinleikin, kunnleikin, meðvitið og bøttur hugburður manna millum um sálarligar sjúkur.

Hjartaliga til lukku Psykiatriska Deild/Depil við teimum fyrstu 40 virkisárunum við ynski um góðan byrð frameftir.

*Vinarliga*
*Eyðun Joensen,*
*sálarfrøðingur*

# Meiri um Psykiatrisku Deild 1 í morgin

29. oktober 1969 læt fyrsta psykiatriska deildin upp í Føroyum, og dagin eftir vórðu teir fyrstu sjúklingarnir innlagdir her.

At tað nú eru liðin 40 ár síðani hesa hending, fer Psykiatriski Depilin at markera við eini móttøku seinnapartin í morgin.

Sosialurin ger eisini nakað við hesa stórhending, m.a. við hesi greinini um Elly Debess í dag og heilsanini frá einum av fyrrverandi starvsfólkunum, sálarfrøðinginum Eyðun Joensen.

Í blaðnum í morgin hava vit samrøðu við nøkur av teimum allarfyrstu starvsfólkunum, eins og leiðandi yvirlæknin, Tormóð Stórá lýsir søguligu gongdina hjá psykiatri'ini í Føroyum.